# Ein heilsan til Jóhonnu Hansen



Tað var skelkandi at frætta at Jóhanna var farin. Vit hittust fyrstu ferð í 1979, tá vit byrjaðu at arbeiða í Drotning Margrethu barnagarði.

Jóhanna var løtt at koma í samband við, altíð smílandi og við tí góða orðinum, og hevði ein framúrskarandi humoristiskan sans.

Jóhanna bleiv so leiðari í barnagarðinum. Hon broyttist ikki, lurtaði altíð eftir starvsfólkunum,hvat vit høvdu upp á hjartað, var altíð góð í ráðum og uggaði um okkurt gekk ímóti.

Eg bleiv sjúk og hevði smá børn; tann sum hjálpti og stuðlaði mær var Johanna. Føldi eg meg ikki væl, ringdi eg til Jóhonnu og hon kom beinanvegin at hjálpa mær.

Børnini í barnagarðinum vóru góð við Jóhonnu. Henni dámdi eisini væl at verða saman við børnunum. Sjálvt um hon hevði nógv at gera á kontórinum, komu børnini í fremstu røð. Vit fingu døgurða í barnagarðinium. Tá ið bar so á at køksdaman var sjúk, tók Jóhanna fyriklæði, og fór at gera mat. Altíð vælsmakkandi.

Soleiðis var Jóhanna. Eg hugsi um Hans Olav og børnini. Tit hava mist nógv, má Harrin styrkja tykkum.

Lýsið frið yvir Johonnu.

**Nita**

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Ása Jakobsen**, ættað úr Fámjin, búsitandi í Tórshavn, fer til gravar úr Havnar Kirkju hósdagin 3. maj klokkan 13. Kistan kemur í kirkjuna mikukvøldið klokkan 18.00. Tey ið vilja minnast Ásu, kunnu lata eina gávu til »Berðin« (børn í sorg) konta í Føroya Banka

**Torgerð Ennigarð, Vestmanna**, andaðist 29 apríl, 70 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju hósdagin 3. mai klokkan 13.

**Sigmar Kristianson**, frá Húsavík í Íslandi, andaðist 28. apríl 60 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum heilsaðu okkum á diamantbrúdleypsdegnum 22. mars.
Eisini ein hjartans tøkk til tykkum, sum komu at syngja fyri okkum.

**Vinarliga heilsan**
**Mia og William Hansen**

Bjørg Mohr Anderssen:

# Listaframsýning í Smiðjuni

**Dýra Biðidag letur Bjørg Mohr Anderssen listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík**

Á framsýningini eru abstraktir málningar, har eitt gjøgnumgangandi tema er dýpdin, sum kemur fram á ymiskan hátt í eyðkenda reyða litinum.

Bjørg hevur áður sýnt fram á Hotel Hafnia, Gallarí Jinx, Ribarhús í Fuglafirði, Leikalund, Varmakelduframsýningini, Glarsmiðjuni, Lionsklub framsýningum, og í Smiðjuni í 2005.

Fernisering verður fríggjadagin 4. mai kl. 14:00

Framsýningin er opin soleiðis: leygardagin kl. 12 – 20, sunnudagin kl. 14 – 18, mánadagin kl. 14 – 18, týsdagin kl. 11 – 18 og mikudagin kl. 11 – 14.

Bjørg hevur heimasíðuna: www.myspace/bjorg_mohr_anderssen



**Dagurin**
**3. mai eitur Krossmessa.** Var hildin til minnis um, at keisarinnan Helena fann Kristi kross. Á krossmessu sigst tjaldrið at hava fult reiður, kavi at vera í hvørjari íðu og sólja í hvørjari veit; men teir halda, at hetta er ov tíðliga, og at meint verður við gomlu krossmessu, ið er 15. mai. Krossmessusnertur er knappligt illveður, sum kann bresta á um hetta mundið. Í 1943 var eitt fólkatingsval í Føroyum, sum var rópt krossmessuvalið. Símun av Skarði varð føddur hendan dagin í 1872

# Túgvan og Tjørnin vitjaðu Miðlahúsið

Týsdagin vitjaðu 11 børn og tvey vaksin úr Barnagarðinum á Konmansmýru í Havn í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Týsdagar skipa tey javnan fyri serligum tiltøkum so sum at ganga túrar, vitja stovnar og arbeiðspláss – og hesaferð var tað bólkur 2001 – sum er børn, fødd í 2001 úr ymsum stovum á stovninum – sum var úti. Tey vóru túr í miðbýnum. Vitjaðu úti á Reyni, har tey spældu á almenna spæliplássinum og vitjaðu ymisk onnur støð í miðbýnum. Um 11-tíðini komu tey so inn í Miðlahúsið at eta matpakkan.



*Tey 11 børnini og starvsfólkini í Barnagarðinum á Konmansmýru í trappuni í Miðlahúsinum. Gamla leyvan hjá William Heinesen er eisini við á myndini. Hon hevur verið í húsinum síðani William og pápin, Zacharias Heinesen, handlaðu har fyri skjótt 60 árum síðani: Á myndini síggjast aftanífrá: Bárður, Jónas, Beinta, Fía, Ronja, Anna, Emi, Astrid Maria, Durita, Niklas, Maj-Britt, Andrass og Kristian*